# Eyðvør segði farvæl við stíli

*Bert ein dystur var í kvinnudeildini um vikuskiftið, og var tað grannauppgerðin millum B36 og HB. Eftir ætlan skuldi VB taka ímóti KÍ, meðan Skála skuldi til Runavíkar, men hesir báðir dystirnir vóru útsettir*

Heini í Skorini

Sunnudagin skuldu eftir ætlan tríggir dystir í kvinnudeildini verið leiktir, men av ymsum orsøkum varð bert grannauppgerðin millum B36 og HB leikt.

Eftir ætlan skuldi KÍ til Suðuroyðar at spæla ein ógvuliga áhugaverdan og spennandi dyst móti VB. Hetta hevði nevniliga verið toppdysturin í 1. deild, men av ymsum orsøkum varð hesin dystur útsettur, og ógreitt er, nær hann verður leiktur.

Botndysturin millum NSÍ og Skála skuldi eisini eftir ætlan vera leiktur í Runavík, men hesin dystur varð tíverri eisini útsettur.

Einasti dystur hetta vikuskiftið var sostatt grannauppgerðin í Havn millum B36 og HB, og hevði hesin dystur stóra ávirkan á, hvussu kappingin fer at síggja út, tá síðsti bóltur í ár er sparkaður .

### Seinasti dystur hjá Eyðvør úr Dímun

B36 hevði áðrenn dystin bert fýra stig fyri tríggjar dystir, og tí var tað av alstórum týdningi, at B36 kvinnurnar fingu trý stig burtur úr hesum dysti. Fyri HB var hetta eisini ein sera týdningarmikil dystur, tí um tær ikki skulu missa KÍ úr eygsjón, skuldu tær vinna sunnudagin.

Hetta var eisini seinasti dystur hjá Eyðvør úr Dímun, sum nú aftur fer til Danmarkar í lestrarørindum. Hon hevur spælt við á HB liðnum í øllum trimum dystunum eftir summarsteðgin, og hevur hon rættiliga gjørt um seg við at skjóta heili fimm mál í hesum trimum dystum. Dysturin sunnudagin var sostatt hennara síðsti, við tað at hon nú aftur fer avstað til Danmarkar. HB kvinnurnar fara heilt víst at fáa tað torførari uttan Eyðvør.

### Tepur sigur til HB

Dysturin sunnudagin var sera javnur og tættur, og í byrjanini av dystinum vildi einki av liðunum leypa framav. Men miðskeiðis í fyrra hálvleiki kom fyrsta mál í dystinum, og vóru tað B36 kvinnurnar, ið løgdu seg á odda. Ein langur bóltur kemur úr vinstru síðu, og Laila Enghamar er fyrst á bóltinum. Málverjin hjá HB kemur út ímóti, og Laila lyftir bóltin hegnisliga upp um Anniku í HB málinum, og so var støðan 1-0 til B36. HB megnaði ikki at fáa mál fyri hálvleik, og sostatt var hetta eisini hálvleiksstøðan.

Men heilt tíðliga í seinna hálvleiki svaraði HB aftur. Bólturin kom inn í B36 brotsteigin, og dómarin var eirindaleysur og gav HB eitt sera ivasamt brotsspark. Annika Godtfred fekk ábyrgdina at skjóta, og hon sveik ikki, men setti bóltin í netið til 1–1. síðani stýrdi HB dystinum við greiðari yvirvág, men tað var ikki fyrr enn í endanum á dystinum, at HB megnaði at fáa málið, ið tryggjaði teimum trý stig. HB fær hornaspark í vinstru síðu, og Annika Godtfred fer at taka. Bólturin kemur høgt og væl innfyri, Eyðvør úr Dímun hægst, og hon skallar bóltin í netið til 2–1 til HB. Eyðvør mundi endurtikið bragdi stutta løtu seinni eftir innlegg úr høgru síðu, men hesaferð fór bólturin á tvørleggjaran. Viviann Thorleifsson hevði ein góðan málmøguleika eftir hetta, men endaliga úrslitið gjørdist 2–1 til HB, og sostatt segði Eyðvør úr Dímun farvæl við at tryggja HB øll stigini.

HB er nú á odda við níggju stigum fyri fýra dystir, VB er á øðrum plássi við sjey stigum fyri tríggjar dystir, meðan KÍ hevur seks stig, men hava tær bert leikt tveir dystir. Síðani kemur B36 við fýra stigum, meðan NSÍ og Skála ikki hava fingið nakað stig enn.

KÍ er stórfavorittur til at gerast føroyameistari í ár, og tær vera væntandi á fyrsta plássi, tá tær hava spælt eins nógvar dystir sum VB og HB.

Næsta vikuskiftið fer eftir ætlan B36 til Runavíkar at vitja NSÍ, VB skal spæla móti HB í Havn, meðan KÍ tekur ímóti Skála. Nær útsettu dystirnir verða leiktir, er ikki avgjørt enn.

**Dysturin hetta vikuskiftið:**
**B36-HB 1-2**
B36: Laila Enghamar 1
HB: Annika Godtfred 1
Eyðvør úr Dímun 1

*Eyðvør úr Dímun hevur rættiliga gjørt um seg við at skjóta heili fimm mál í trimum dystum*




## Máltindurin

| | | |
|---|---|---|
| Guðrun í Lágabø | VB | 6 |
| Eyðvør úr Dímun | HB | 5 |
| Rannvá Andreasen | KÍ | 4 |
| Annika Godtfred | HB | 3 |
| Malena Josephsen | KÍ | 3 |
| Laila Jespersen | VB | 3 |
| Sólvá Joensen | B36 | 2 |
| Maibritt Olsen | NSÍ | 2 |
| Annika Poulsen | VB | 2 |
| Halldóra Joensen | VB | 2 |
| Elsebeth Jónsson | B36 | 1 |
| Laila Enghamar | B36 | 1 |
| Maria Vang | B36 | 1 |
| Sólgerð Viderø | B36 | 1 |
| Margit Joensen | KÍ | 1 |
| Ragna Andreasen | KÍ | 1 |
| Vivian Bjartalíð | KÍ | 1 |
| Irdi Hansen | NSÍ | 1 |
| Diana Dahl | VB | 1 |
| Rannvá Augustinussen | VB | 1 |
| Sjálvmál | | 1 |

adidas

## Støðan 1. deild kvinnur:

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 4 | 3 | 0 | 1 | 8 | 10 | ÷2 | 9 |
| 2 | VB | 3 | 2 | 1 | 0 | 16 | 3 | 13 | 7 |
| 3 | KÍ | 2 | 2 | 0 | 0 | 10 | 0 | 10 | 6 |
| 4 | B36 | 4 | 1 | 1 | 2 | 6 | 5 | 1 | 4 |
| 5 | NSÍ | 2 | 0 | 0 | 2 | 3 | 6 | ÷3 | 0 |
| 6 | Skála | 3 | 0 | 0 | 3 | 0 | 19 | ÷19 | 0 |

# Slovenia uttan Zahovic

*Líkt er til, at størsta stjørnan hjá slovenum ikki verður við, tá teir um fáar vikur koma til Føroya*

Tann víðagitni stjørnuspælarin Zlatko Zahovic er ikki millum teir átjan úrvaldu slovensku landsliðsleikarar, sum í dag spæla sín seinasta vinardyst undan HM-2002 undankappingini, har Slovenia er í sama bólk sum Føroyar. Tey bæði liðini møtast inni á Toftum longu í fyrsta umfari, sum verður spælt í vikurskiftinum 2.–3. september.

Søgurnar ganga um, at Zahovic, ið er kendur í ítróttarheimi ikki bara sum ein av teimum allarbestu álopssinnaðu miðvallarunum í Evropa, men eisini fyri sítt umstrídda lyndi, er blivin óvinur við slovenska landsliðsvenjaran Srecko Katanec. Burtursæð frá Zlatko Zahovic, ið skifti í summarsteðginum frá grikska Olimpiakos, har hann ikki fekk spælt orsakað av ósemju við leiðsluni í felagnum, til spanska Valencia, eru allir hinir slovensku útisetarnir tøkir til vinardystin ímóti Kekkia í Ostrava.

Ætlanin var annars tann, at allir teir bestu spælararnir uttan undantak skuldu samlast hesa vikuna á venjingarlegu til seinastu fyrireikingar til tilstundandi HM-undankappingina.

Zahovic skoraði 12 av teimum 19 málunum, ið Slovenia fekk í undankappingini til Euro-2000 og í sjálvum endaspælinum. Hesi tølini undirstrika einaferð afturat, hvussu ómetaliga týdningarmikil hann er fyri landsliðið.

Valencia-stjørnin hevur kortini ongantíð sagt, at hann fór at gevast á landsliðnum. Frávera hansara fer tí ivalsyst at ávirka bæði fyrireikingarnar hjá Slovenia til undankappingina, og spælið ímóti Kekkia.

### Øll royna seg

Øll hini mótstøðuliðini hjá føroyingum í undankappingini, burtursæð frá Luksemburg, leika eisini vinardystir í dag.

Russland við gamla kenningi Oleg Romantsev á odda, tekur í Moskva ímóti Ísrael við vón um at hevna Richard Møller Nielsen og hansara menn fyri stórtapið (1–4) á útivølli fyrr í ár. Sveits, sum føroyingar møta í Zúrich leygardagin tann 7. oktober, roynir seg í St Gallen ímóti Grikkalandi. Nýggjur venjari hjá Sveits er fyrrverandi argentinski landsliðsspælarin Enzo Trossero. Jugoslavia, somuleiðis við nýggjum venjara, Ilja Petkovic, skal í Belfast royna seg móti Norðurírlandi. Føroyar og Jugoslavia spæla í Beograd mikudagin tann 11. oktober.

**ie**



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3059

**Navn:** Sp/f Inntech
**Adressa:** 690 Oyndarfjør›ur

**Kommuna:** Oyndarfjar›ar Kommuna
**Stovningardato:** 10.08.2000
**Vi›tøkudato:** 10.08.2000
**Kapitalur:** Kr. 100.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 100.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Fró›i Rógvi Nielsen, 690 Oyndarfjør›ur.
**Stjórn:** Fró›i Rógvi Nielsen, 690 Oyndarfjør›ur.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur tekna› av einum stjóra.
**Grannsko›ari:** : P/F Rasmussen & weihe, á Gla›sheyggi, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 10.08.2000 - 31.12.2001
**Endamál:** Endamál felagsins er at eiga fasta ogn, reka útlei›ing, handil og anna› starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 14. august 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3053

**Navn:** Sp/f Atlantic Fair
**Hjánøvn:** Sp/f Faroe Fair (Sp/f Atlantic Fair), Sp/f North Atlantic Fair (Sp/f Atlantic Fair), Sp/f North Atlantic Fish Fair (Sp/f Atlantic Fair), Sp/f Atlantic Fish Fair (Sp/f Atlantic Fair), Sp/f Faroe Fish Fair (Sp/f Atlantic Fair) Sp/f North Atlantic Oil Fair (Sp/f Atlantic Fair), Sp/f Atlantic Oil Fair (Sp/f Atlantic Fair) og Sp/f Faroe Oil Fair (Sp/f Atlantic Fair)
**Adressa:** 600 Saltangará
**Kommuna:** Runavíkar Kommuna
**Stovningardato:** 05.07.2000
**Vi›tøkudato:** 05.07.2000
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnarar:** Áki í Skemmuni, 600 Saltangará og Andrias Jacobsen, 625 Glyvrar.
**Stjórn:** Áki í Skemmuni, 600 Saltangará og Andrias Jacobsen, 625 Glyvrar.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur bundi› vi› undirskrift hjá stjóranum, ella um ta› eru fleiri stjórar av stjórunum í felag.
**Grannsko›ari:** : Sp/f Grannsko›arastovan á Skála, 480 Skáli.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 05.07.2000 - 31.12.2001
**Endamál:** Endamál felagsins er at skipa fyri sølustevnum og ø›rum virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 14. august 2000

Kristin Balle

---

**Í dag eru fylgjandi partafeløg undir tvingsilsavtøku strika› úr partafelagsskránni:**

Skrásetingar-nr. Sp/F 1501, **Sp/f Handskavirki› á Húsum, 796 Húsum**
Skrásetingar-nr. P/F 1715, **P/F Sandoyar Eltænastan, 220 Skálavík**
Skrásetingar-nr. Sp/f 2364, **Sp/f J.R. Fisk, 700 Klaksvík**

**Í dag eru ni›anfyri standandi feløg í likvidatión strika› úr partafelagsskránni:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 852, **Sp/f So Far, 188 Hoyvík**
Skrásetingar-nr. P/F 2254, **Sp/f Studio 93, 100 Tórshavn**
Skrásetingar-nr. Sp/f 2432, **Sp/f Fjølverk, 100 Tórshavn**
Skrásetingar-nr. Sp/f 2745, **Sp/f Vágsbotnur, 100 Tórshavn**

**Í dag eru ni›anfyri standandi feløg undir trotabúarvi›ger› strika› úr partafelagskránni:**

Skrásetingar-nr. P/F 284, **Sp/f C.C. Jóhansen, 100 Tórshavn**
Skrásetingar-nr. P/F 958, **Sp/f Føroya Steintoy, 850 Hvalba**

Skráseting Føroya tann 15. august 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi partafelag:**

**Skrásetingar-nr.** P/F 3046

**Navn:** P/F Tórgrím Hansen
**Adressa:** 410 Kollafjør›ur

**Kommuna:** Kollafjar›ar Kommuna
**Stovningardato:** 27.06.2000
**Vi›tøkudato:** 27.06.2000
**Kapitalur:** Kr. 850.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kr. 850.000,00 í ø›rum vir›um til kurs 100.
**Stovnari:** Tórgrím Hansen, 410 Kollafjør›ur.
**Nevnd:** Leif Hansen, 410 Kollaafjør›ur (forma›ur), Tórgrím Hansen, 410 Kollafjør›ur og Hallgrím Hansen, 410 Kollafjør›ur.
**Stjórn:** Tórgrím Hansen, 410 Kollafjør›ur.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur bundi› vi› undirskrift av einum stjóra ella allari nevndini.
**Grannsko›ari:** : Grannsko›aravirki› Hermund Jacobsen, J. Paturssonargøta 18, Box 16, 110 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2000 - 31.12.2000
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka handil, ídna›, tænastuvinnu, herundir lastbilakoyring, og a›ra vinnu í sambandi vi› hetta.
**Felagi›** er stovna› vi› umskipan av virki eftir umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 14. august 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3043

**Navn:** Sp/f C. C. Johansen
**Adressa:** Sundsvegur 21, 100 Tórshavn

**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 29.06.2000
**Vi›tøkudato:** 29.06.2000
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** : Kr. 80.000,00 í ø›rum vir›um til kurs 480.
**Stovnarar:** Anna Caroline Weisner Johansen, Sundsvegur 21, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Anna Caroline Weisner Johansen, Sundsvegur 21, 100 Tórshavn.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur bundi› vi› undirskrift av stjóranum.
**Grannsko›ari:** : Sp/f KPMG, statsaut. Revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2000 - 31.12.2000
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka byggivirksemi og handil, herundir heilsøluvirksemi.

Skráseting Føroya tann 14. august 2000

Kristin Balle

---

GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Sunny 1.4 LX** Brúnur, 4 hurðar, árg. 1992, 119.000 km. **47.000**
**Nissan King Cab 2500** Diesel 4x4, reyður, 2 hurðar, árg. 1987, 150.000 km. **45.000**
**Peugeot 106** Diesel, 3 hurðar, 69.000 km. **85.000**
**Peugeot 306** DTurbo h/b, bláur, 5 hurðar, árg. 1998, 60.000 km. **135.000**
**Kia Sephia** Grønur, 4 hurðar, árg. 1997 **76.000**
**Mazda E2200 Van** Diesel, hvítur, 4 hurðar **98.000**
**Mitsubishi L200** Bláur, 2 hurðar, árg. 1996, 59.000 km. **148.000**
**Opel Astra 1.6 Sedan** Reyður, 4 hurðar, árg. 1996, 39.000 km. **95.000**
**Peugeot 306 Style 1.6** Reyður, 4 hurðar, árg. 1998, 35.000 km. **103.000**
**Suzuki Baleno 1.3 GL** Bláur, 4 hurðar, árg. 1998, 22.000 km. **96.000**

Sosialurin

Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo
P/f Meinhardt Arge
Tjaldursvegur • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

DANNY TRANSPORT
- tá okkurt skal koyrast ella goymast
Tlf. 319192

SJÓNLEIKARA-STEVNAN 2000
verður í Klaksvík 1.–3. september.
Tekning á MáF-skrivstovuni í seinasta lagi 28. august á **tlf. 31 56 24**
*www.maf.fo*

Trygdarútgerð til øll endamál!
• Verndarhjálmar og húgvur
• Hoyrivernd v/FM radio
• Brillur
• Maskur
• Trygdarskógvar
• Fallsikringar
• Handskar
• Hondreins
• Vit útvega skiltir til øll endamál!
Vit taka okkum av øllum uppgávum innan arbeiðaravernd
Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008
Sosialurin - 311820



*Enn ein møguleiki at ogna sær teldukoyrikortið*

Fá teldukoyrikortið fyri hálvan prís.

Vit hava fleiri møguleikar til stovnar, fyritøkur og einstaklingar.

Hava tit undirvísarar, ***hava vit høli og útgerð.***

Hava tit hvørki undirvísarar ella høli, ***hava vit bæði.***

Búgva tit á útoyggj, hava skiftandi arbeiðistíðir ella eru til skips, hava vit eisini loysnina til tykkara.

Tøknidepilin er góðkent testsentur til teldukoyrikortið.

Um tú/tit eru áhugað, fæst meira at vita á tlf. 211434 ella 214144.
Eisini kann farast inn á www.postfelag.fo

**Føroya Postfelag**
Tinghúsvegur 15 · 100 Tórshavn